leggur at, og Hans Pauli gleðir seg til at síggja konuna taka ímóti sær, fær hann í staðin boð um at fara beinleiðis til hennara jarðarferð. Soleiðis var lívið eisini tá.

Diurin minnist eisini, at tað sama hendi við Sigmund á Rananum. Tá ið hann kom aftur av skipi við Agnes Louise kom prestur umborð at siga honum frá, at konan, Petrina, var deyð. Her var tað á sama hátt, at Petrina var við at fara til gravar, táið teir síggja skipið koma inn eftir fjørðinum, so Sigmund fór beint í jarðarferð. Petrina doyði í barnsferð, og barnið doyði eisini. Hetta var í 1926.

Arthur Waag ivaðist ikki í, at hetta stóra mannfall millum kvinnur í Suðuroy merkti hóttafall fyri Suðuroynna. Hetta kom jú afturat øllum fiskimonnunum, sum fórust tá, og sum greitt fer at verða frá í samband við, at tað í februar eru 85 ár síðan, at General Gordon fórst.

Arthur Waag fekk staðfest, at nátasjúkan var ein serlig sjúka, sum hevði við tøku av náta at gera, meðan eiðislæknin R. K. Rasmussen fekk staðfest, hvør sjúkan var. Úrslitið var, at tøka av havhestaungum varð bannað i 1938. Arthur Waag hevði nógv fortreð av, at hann ikki fekk tann heiður í hesum sambandi, sum hann hevði uppiborið. Hetta komst partvíst av, at báðir læknarnir kallaðust Rasmussen, og tí kom bland í hvør var hvør.

## Góð inntøka við Rádna

Aftaná kríggið flytir Diurin við húski til Vágs at búgva, har tey eisini høvdu handil. Diurin fór eisini at fáast við reiðaravirksemi.

Beint eftir kríggið var Diurin við at keypa trolaran Rádna til Vágs. Reiðari var Elith hjá Dias á Heyggi, og Dánjal hjá Mouritsi var skipari mesta av tíðini. Rádni var ein bretsk korvett, sum var brúkt undir krígnum. Hon varð fullkomiliga umbygd í Vági, eitt arbeiði, sum tók 15 mánaðir undir leiðslu av Argja Palla. Tá hevði hann eisini fingið oljufýring, sum var eitt stórt frambrot í mun til teir nógvu kolfýrdu trolararnar. Men Diurin heldur ikki, at hetta var eitt gott skip. Hesi krígsskipini vóru gjørd í skundi, og tað var ikki so nógv gjørt burtur úr teimum, tí nógv teirra vórðu søkt kortini! Upphaldsrúmini vóru eisini vánalig. Rádni fekk somu lagnu sum hinir trolararnir, hann fór á húsagang og fór av landinum aftur.

Diurin var nakrar túrir við á saltfisk og ísfisk. Ein sum var saman við Diinum við Rádna var bygdarmaður hansara Otto Dam, sum nú býr á Argjum. Hann fór sum ungur til skips við Rádna, og var hann biðin við av Diinum.

Otto letur sera væl at Diinum at vera saman við. Hann var raskur, róligur í síni medferð, og so var hann eisini so góður við teir ungu. Hetta er ein eginleiki, sum ikki verður gloymdur!

Rádni var ein rimmar kjansur. Inntøkurnar vóru millum tær størstu fiskimannainntøkur yvirhøvur. Hetta var byrjanin uppá trol- og trolaralívinum hjá Otto. Hann kom at sigla við trolara í nógv ár, og tá ið hann legðist uppá land, fór hann at arbeiða uppá trol á trolvirki. Hesum helt hann áfram við, til hann táttaði í tey 80 árini. Framvegis minnist hann við takksemi Diin, sum hann, ið fekk sett hann við sum trolmann!

Otto og Ingrid høvdu gullbrúdleyp seinasta leygardag. Ynskt verður teimum tillukku!

Rádni var annars fyrsti føroyski trolari, sum rendi seg í tosk undir Grønlandi eftir kríggið.



*Kristianna Sørensen, ættað úr Lorvík, var ein av teimum fimm konunum í Porkeri, sum í september 1937 doyði av havhestasjúkuni. Viggo Joensen úr Lorvík talaði á jarðarferðini*

## Keypti Selnes

Diurin keypti sluppina Selnes fyri 25.000 kr. Hann rak hana sjálvur á snørisveiðu við Andrev Lindarstein úr Skúvoy sum skipara.

Í 1952 vóru teir seinir á Suðurlandið, men fingu 213 skippund vártúrin. Um 20. juli komu teir heim við 300 skippundum, og um 10. september komu teir við 300 skippundum.

Nakað tað sama gekk í 1953. Í 1954 fóru skipini ikki avstað aftur fyrr enn í apríl vegna fiskimannaverkfall í fleiri mánaðir. Teir høvdu tikið salt men máttu fortoya skipið við saltinum! Selnes fekk 334 og 322 skippund tveir túrar eftir verkfallið.



*Melchior og Kathrina Nicodemussen, verforeldrini hjá Diinum*

Í 1955 gekk á nakað sama hátt. Christian Clementsen av Sandi sigur í Siglingarsøguni, at hesi árini hjá sær við Selnes vóru góð inntøkuár, sum lønirnar vóru tá. Hetta kann eisini sigast at vera eitt herðaklapp til Diin.

Diurin leigaði Selnes út til aðrar reiðarar á sild og útróður. Eitt ár reiddi hann Selnes á sildaveiðu saman við garnavirkinum á Oyri við Aksel og Esmar Dahl, sum lótu reiðskapin. Báðir partar láta sera væl at samstarvinum. Garnavirkið keypti seinni Selnes og hevði hann í nøkur ár.

## Á ídnaðarveiðu

Men Diurin var eisini millum teir fyrstu á ídnaðarfiskveiðu. Í 1971 keypti hann saman við versoninum Viberg og pápa hansara Ansgar Sørensen ídnaðartrolaran Norðland, og gekk hetta væl. Kann siga av royndum, at Diurin var ein góður reiðari. Men so fór at ganga niður á bakka við ídnaðarfiskinum, og Norðland varð seldur í 1974.

## Fluttu til Havnar

Í 1970 flutti Ragnhild og Diurin til Havnar, har tey bygdu sær hús úti í Grønlandi. Fyrstu árini arbeiddi hann í Skipshandlinum og seinni á Telefonverkinum, har hann arbeiddi, til hann var 75 ára gamal.

Diurin og Ragnhild fingu døturnar Ina, sum andaðist í 2007, Oddvør, Brynhild og Jóna. Brynhild býr í Danmark, meðan hinar búgva í Føroyum. Abbabørnini eru 10, og langabbabørnini eru 23, so væl er komið burtur úr!

Tað verður ynskt Diinum hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum. Hann hevur verið ein av teimum, sum hava bygt land uttan nógvan háva.



*Diurin átti í Rádna, sum var ein uppá seg framkomin trolari aftaná kríggið*



*Andrea og Petur Hans, systkin hjá Diinum doyðu bæði um 15 ára gomul*

**Komandi partur**

Í komandi parti frætta vit aftur frá Anton Petersen um hansara útróður í Grønlandi. Í komandi parti er hann tó eitt legg í Íslandi

Sosialurin